hotelstreym
TÓRSHAVN

**Løgtingsins Vinnunevnd**

**V/Bjørt Samuelsen, forkvinna**

*Viðvíkjandi hjálparpakka 2*

Tað er hugaligt at hoyra, at bæði andstøða og samgonga vilja hjálpa, nú smáfyritøkur koma í trongstøðu orsakað av Korona-smittuni.

Hjá nógvum kemur, tað ið er á borðinum, og tað, ið nevnt varð undir orðaskiftinum, at verða til stóra hjálp.

Vegna okkara fyritøku – og ivaleyst fleiri í somu støðu – loyvi eg mær at vísa á óhepna gjaldførisstøðu orsakað av komandi skattarokningini.

Vit hava havt góð avlop fleiri ár, men hava brúkt og brúka avlopið til útbyggingar, so hóast mong góð ár, er gjaldførið ikki gott. Og nú summarinntøkan svíkur ( vanliga ber summarið okkum og starvsfólk okkara gjøgnum hallgevandi vetrarnar ), fáa vit gjaldføris-trupuleikar av hesi hálvu milliónini, vit eiga at gjalda í skatti seinni í ár.

Einki meini eg, at fyritøkur skulu fáa skattin strikaðan av hesum, men loyvi mær at heita á vinnunevndina, at finna útvegir fyri, at TAKS fær loyvi at utseta rindan av skatti í upp til 1 ár hjá fyritøkum ( innan ferðavinnuna ), soleiðis at skattur, ið er álagdur í 2020, kann rindast í 2021, tá viðurskiftini vónandi aftur hava stabiliserað seg.

Vi ynskjum um góða eyðnu og Gleðiligar Páskir!

Tórshavn 5. apríl 2020

V/Hotel Streym

Svend Aage Ellefsen